Bygningurin hjá Føroya Tele:

# Hava heintað tað mista innaftur

**Við at seta fleiri fólk og at hava longri arbeiðsdagar er tíðarætlanin við nýggja bygninginum hjá Føroya Tele komin aftur á rættkjøl eftir tað drúgva verkfallið**



*Nýggi bygningurin hjá Føroya Tele er nakað aftanfyri tíðarætlanina, men arbeiðsmenninir hava longu heintað tríggjar av teimum fimm vikunum, tá arbeiðið lá stilt, innaftur. Hetta er gjørt við at fáa fleiri fólk til arbeiðis og við at arbeiða fleiri tímar hvønn dag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

BYGGING
*Stefan í Skorini*

Støðan er nú hon, at tey seinastu betongelementini verða sett upp í hesi vikuni, og nú eru menn farnir undir at seta stálkonstruktiónina upp.

Tann risastóri bygningurin hjá Føroya Tele er við at taka skap, og fyri hvønn dag síggjast stórar broytingar.

– Vit stúrdu eitt sindur fyri, at vit ikki kláraðu at halda tíðarætlanina, tá verkfallið dró so langt út, sigur Jóannes Niclassen, projektleiðari hjá MT Højgaard Føroyar.

Men hóast verkfallið vardi í fimm vikur, eru arbeiðsmenninir ikki so langt aftanfyri tíðarætlanina, sum varð løgd, áðrenn arbeiðið byrjaði.

### Tvær vikur aftanfyri

– Vit eru nú tvær vikur aftanfyri ta upprunaligu tíðarætlanina, tá talan er um betongelementini, men hóast vit ikki eru heilt lidnir við betongelementini, kunnu vit fara undir at seta stálkonstruktiónina upp til tíðina, sigur Jóannes Niclasen.

So skjótt verkfallið var veruleiki, fóru verkfrøðingarnir undir at leggja eina nýggja tíðarætlan við tí fyri eygað at hála mistu tíðina innaftur.

– Vit tóku allar smálutir í byggingini til umrøðu, og gjørdu so eina nýggja ætlan, so at byggingin kundi ganga skjótari, sigur Jóannes Niclasen, og hann leggur afturat, at nú er einki út at geva í tíðarætlanini.

Hetta innibar at fáa fleiri fólk til arbeiðis, og tey skuldu arbeiða fleiri tímar hvønn dag. Í løtuni eru fimmti fólk til arbeiðis á byggiplássinum.

Hetta hevur sjálvandi dýrkað nakað um prosjektið, men ikki so mikið at tað órógvar byggingina á nakran hátt.

Serliga hastaði tað við at fáa betongelementini sett upp skjótari enn ætlað. Fyri at fáa gongd á hetta arbeiði, vórðu tríggir serfrøðingar í uppseting av slíkum elementum tilkallaðir, soleiðis at tað nú eru átta slíkir serfrøðingar til arbeiðis ístaðinfyri fimm, sum tað vóru áðrenn verkfallið.

### Reist í august

Ætlanin er, at bygningurin verður reistur miðskeiðis í august. Eftir ætlan skal tað vera 12. august, men tað kann vera, at hendan dagfestingin verður broytt.

– Bygningurin skal vera innilokaður í oktober, og tann tíðarætlanin fer heilt vist at halda, sigur Jóannes Niclassen, prosjektleiðari fyri byggifelagið MT Højgaard Føroyar.

# Føroyar marknaðarførast í Póllandi

**Eitt pólskt forlag, sum eitur TRAMP, hevur gjørt ein pólskan bókling um Føroyar sum ferðamannaland. Hesin bóklingurin er sera snøggur og væl úr hondum greiddur**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*

Bóklingurin er sera snøggur á at líta. Nógvar upplýsningar um Føroyar og Norðurlond eru í honum. Og størsti parturin er sjálvandi um Føroyar. Uppbýtt yvir tær 18 oyggjarnar eru frágreiðingar og vakrar myndir frá ymsum áhugaverdum støðum, har tað kundi verið spennandi hjá einum ferðamanni at vitja. Somuleiðis er eitt lítið yvirlit yvir nøkur av teimum mest vanligu orðunum og setningunum, sum ein ferðamaður hevur tørv á, tá hann er í Føroyum. Ein mini-orðabók, um ein kann kalla tað so. Eisini er eitt sindur um søgu landsins og mentan, so póllendingurin kann ogna sær eitt sindur av vitan um Føroyar, áðrenn hann kemur til landið. Myndir eru av náttúruni, føroyska dansinum og búnanum, fuglalívinum og bygdum og býum. Nógv er gjørt burturúr Streymoynni, men tó fáa allar 18 oyggjarnar sítt pláss í vakra bóklinginum. Um allir upplýsningarnir í honum eru rættir, skal her verða ósagt, tí hann er skrivaður á pólskum, men ein kann ganga út frá, at tað er á góðari leið, tí báðir rithøvundarnir hava verið í Føroyum í eitt tíðarskeið.

Tað er ongin ivi um, at bóklingurin er gjørdur av professionellum, tí hóast ein, sum ikki dugir pólskt, ikki skilir eitt orð av tí, sum stendur í, so fær ein eina góða og positiva mynd av honum. Og hann er uttan iva ein góð hjálp hjá póllendingum, sum møguliga ætla sær at leggja leiðina framvið Føroyum.

### Marknaðarføra Føroyar

Tað er tveir rithøvundar, sum hava gjørt bóklingin. Marcin Jakubowski og Marek Loos. Tann fyrri av teimum eigur forlagið TRAMP, sum hevur gjørt nógvar aðrar bóklingar av hesum slag. Serliga innan ferðavinnuna. Og tann seinni er ein blaðmaður, sum arbeiðir á tí størsta dagblaðnum í Poznan, sum er ein av størstu ídnaðarbýunum í Póllandi.

Talan er um tveir royndar rithøvundar, sum hava arbeitt serstakliga nógv innan ferðavinnuna.

Bóklingurin um Føroyar er sostatt ikki tann fyrsti av sínum slagi. Har finnast aðrir, til dømis um Bornholm og Skåne. Í løtuni fáast tey við ein bókling um Suður-Svøríki, sum eisini verður givin út á pólskum.

Orsøkin til, at tað verður gjørt so nógv burturúr at varpa ljós á Føroyar og Norðurlondini yvirhøvur er, at hesi gerast alsamt meiri og meiri vælumtókt støð hjá póllendingum at ferðast til.

– Føroyar vóru so gott sum heilt ókendar í Póllandi, og tað gjørdu vit av at gera nakað við, siga báðir rithøvundar í tíðindaskrivi. Og sjálvir hava teir somuleiðis stóran áhuga fyri Føroyum og tess náttúru og mentanarlívi. Og teir leggja afturat, at tað, at oyggjarnar eru eitt náttúru paradís, og at har búleikast ein av heimsins minstu og mest áhugaverdu tjóðum, vekir í sjálvum sær áhuga fyri landinum, um bara fólk fáa at vita, at tað er til.




*Eitt póllendskt forlag hevur givið út ein sera snøggan, pólskan bókling um Føroyar við tí fyri eyga, at Føroyar skulu gerast meiri kendar sum ferðamannaland í Póllandi*



# Stuttligt, flatt og genialt

**Tað var ein fragd at bukka beinini í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið, tá Sjúrður og Jákup, alias Pipar og Salt, góvu alt, teir høvdu í sær. Nógv fleiri perlur enn kukkar vóru ímillum sketsjirnar, og onkur teirra hevur helst givið lív til fleiri nýggjar vendingar**

PIPAR OG SALT
*Tekstur: Ingi Rasmussen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Stuttligt fyri tað mesta. Flatt til tíðir. Genialt í støðum.

Framførslan hjá Pipari og Salti livdi upp til høgu vónirnar, tá Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe høvdu fýra framsýningar í stúvstappaða Norðurlandahúsinum um vikuskiftið.

Fríggjakvøldið var ein sýning, leygardagin var ein og sunnudagin vóru tvær sýningar, og tað sigur alt um, at teir báðir hava fingið kultstatus og hava fullkomiliga endurnýggjað føroyskt skemt. Jákup og Sjúrði gjørdu eisini eitt rend á Vestanstevnu, so teir eru helst nakað moyrir eftir vikuskiftið, tí øll sýningin, sum hon var, var ein stór orkubumba, ið kravdi nógv av teimum.



*Tann føroyski Elvis býtti blómur út til fólkini*

### Skótin kløkkaði

Framførslan byrjaði við einari friðarligari intro frá Kim og James, sum spældu undir. Men so kom skótin í Bø buldrandi og kløkkaði øll. Fólk spentu sansirnar og flentu í kíki, tá skótin dansaði solo og ýldi »Kikkilikkatjovtjov«, so høvdið stóð at bresta.

Støðið varð líkasum lagt, men snildisliga syrgdu Pipar og Salt fyri at skifta ímillum høgt tempo og friðarligar samrøður. Fyrstu løtuna flentu vit bara, tí vit vóru so glað fyri at síggja teir aftur. Aftaná hevði tú hug at síggja alt umaftur fyri at fáa detaljurnar við.

### Eldri og búnari

Pipar og Salt eru búnaðir, og hóast nógvir persónar framvegis ganga aftur, so eru teir eisini vorðnir eldri. Esmar Eysturoy er vorðin embætismaður í heilsumálaráðnum, kallar seg »Analytic Advisor«, og helt fyrilestur í Norðurlandahúsinum um almennu umsitingina. Loysnin var at gen-spleysa Esmar, so øll umsitingin hugsaði eins. Og sum frá leið helt Esmar eisini, at tað fór at bera til, at øll í Føroyum fóru at líkjast Esmari í bæði útsjónd og verumáta. Ein ræðandi tanki.

Esmar var aftur hesaferð eitt hæddarpunkt í sýningini. Hóast hann framvegis helt, at Guðrun var eitt sindur býtt, so viðgekk hann, at hann kundi ikki liva uttan hana. Og fyri at fáa hana aftur, noyddist hann á knæ at geva Guðruni eitt sóljutyssi við orðunum »tú ert mín Guðrun Sólja«.



*»HEY« søgdu teir, tá teir »bukkaðu beinini«*

### Lortaland

Dálkingin og lortalívið í Vágsbotni slapp heldur ikki undan. Við »Frankfurter Algemeine« undir arminum filosoferaði Ábal um allar kukkarnar úr kloakkini í Tinganesi, sum flutu á bryggjuni. Eingin ivaðist, hvønn hann meinti við, tá hann stóð uppi yvir einum lítlum, klønum og hørðum og einum stórum, rundum og bleytum, sum stýra okkara landi, og hugleiddi »hvat sigur tú ikki nógv um lívið.«

Politikkurin fekk meira pláss hesaferð, og vit fingu at vita, at fólkafloksmenn hava langar fingrar, sambandsfólk eru deyv, javnaðarfólk liva av tí almenna og tjóðveldisfólk berjast, meðan sjálvstýrisfólk skifta meining og Jenis sveimar.

Baptistarnir fingu eisini sítt, og sambært Pipari og Salt eru teir vorðnir tystari enn áður. »Tað er tíðin«, segði Símun, sum eisini selur parabolir við ótespiligum innihaldi. Tað er í øllum førum heilt vist, at fólk fara at kalla tað at fáa sær ein lítlan fyri »at bukka beinini« og fara at siga »hey« í staðin fyri »skál«.

### Rørandi genialt

Inkarneraði HB-arin, Kalle Mohr, er vorðin pensjoneraður, men hann møtir til hvørja kaffipausu og lokkar enn sum áður Børge at keypa sær eina øl.

Teir báðir fóru at tosa um hetta við ølini, samanbóru tað við blokkstuðul og »avhengigheit«, og tað var sera rámandi og skemtiligt, men tá Kalle Mohr einsamallur setti seg og varpaði ljós á lívið, ið er sum ein flættaður tráður, so var tað næstan rørandi.

So nógvar sketsjir vóru – eitt nú ein fín um Prix-vinnararnar Gestir, ein suveren framførsla frá tí føroyska Elvis og ein um danskaran, sum er meira føroyskur enn føroyingar – at ógjørligt er at nevna allar. Hvør var betri enn onnur.

Millum áskoðararnar sótu fleiri fólk frá ólavsøkukabarettini, og tey hava helst ilskast eitt sindur um, at Pipar og Salt hava flutt seg inn á teirra økið. Teir eru farnir at viðgera viðurskifti, sum eru uppi í tíðini, seta tey upp á rím, og eru í heilatikið vorðnir meira politiskir. Hinvegin kunnu kabarettfólkini fegnast um, at tey hava fingið í0blástur til sína kabarett, tí heilt sum Sjúrður og Jákup verður ongin.

Hóast teir eru vorðnir eldri, so eru teir framvegis egnir og genialir.



*Tú ert mín Guðrun Sólja, segði Esmar eyðmjúkur*



*Skótin í Bø dansar solo*